# Vilja hava fólkaatkvøða um at leggja Suðuroy í eina kommunu

**Í sambandi við fólkatingsvalið, fer Tvøroyrar Býráð at heita á hinar kommunurnar í Suðuroy um at skipa fyri fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging**

KOMMUNUSAMANLEGGING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tá ið kommunuvalið var í november, atkvøddu bæði sumbingar og tvørafólk eisini um kommunusamanlegging. Her er ein atkvøðir ein veljari á Tvøroyri á kommunuvalinum. Í vinstru hond hevur hann atkvøðuseðilin til kommunuvalið og í høgru hond hevur hann atkvøðuseðilin um kommunusamanlegging*

Nú eigur fólkaatkvøða at verða í Suðuroy um at leggja allar Suðuroynna í eina kommunu.

Tað heldur Tvøroyrar Býráð.

Nú suðuroyingar skulu á fólkatingsval 8. februar, heldur Tvøroyrar Býráð, at tað er eitt frálíkt høvi til eisini at halda fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging í oynni.

Tí hevur býráðið samtykt at heita á bý- og bygdaráðini í oynni um at skipa fyri fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging, samstundis sum fólkatingsvalið er.

– Eftirsum fólk skulu á fólkatingsval kortini, er tað eitt gylt høvi til at lata veljararnar sleppa at siga sína hugsan um kommunusamanlegging, heldur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri.

Tað letur seg væl gera at hava tvær fólkaatkvøður ísenn.

Einasta treyt er, at greiðurskilnaður er ímillum báðar atkvøðugreiðslurnar. Sostatt skulu atkvøðuseðlarnir hava hvør sín lit og at teir skulu eisini í hvør sín atkvøðukassa.

### Tvær kommunur hava valt

At hava fólkaatkvøðu í Suðuroy um kommunusamanlegging, er ikki ein heilt nýggjur tanki.

Uppundir kommunuvalið í november heitti Sumbiar Bygdaráð á allar kommunurnar í oynni um at halda fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging í sama viðfangi, sum kommunuvalið var.

Men tá vóru tað bara Sumbiar- og Tvøroyrar kommuna, sum fylgdu áheitanini og samstundis sum kommunuvalið var, sluppu veljararnir í hesum báðum kommunum soleiðis eisini at siga sína hugsan um kommunusamanlegging.

Og í báðum kommununum var heilt greiður meiriluti fyri at leggja alla Suðuroynna í eina kommunu.

Spurningurin, sum veljararnir fingu at svara, var einfaldur. Spurt varð stutt og greitt um øll Suðuroyggin skuldi vera ein kommuna og so kundu veljararnir seta krossin við »ja«, ella við »nei«.

Og nú heldur Tvøroyrar Býráð at eisini veljararnir í hinum fimm kommununum í Suðuroy eisini eiga at fáa høvi til at siga sína hugsan um kommunusamanlegging.

Kristin Michelsen sigur, at ein orsøkin til at summar kommunur ikki vildu halda fólkaatkvøðu um kommunusamanleggin í sambandi við kommunuvalið, varð at fráfarandi bygdaráðini vildu ikki taka so álvarslig stig, nú tey skuldi frá kortini.

Men nú eru nýggj bý- og bygdaráð komin til, so nú er eitt gott høvi at fáa at vita, hvat veljarin heldur um kommunusamanlegging, sigur borgarstjórin á Tvøroyri.

# Børnini hugna sær á spæliplássinum

**Spæliplássið í Rituvík er ikki heilt liðugt enn. Men tað forðar kortini ikki børnunum í at gera brúk av møguleikunum har. Best er um summarið, men eisini ein góður mikudagur í januar mánaði kann brúkast**

BARNAANSING

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Børnini og tær báðar dagrøktarmammurnar, Sigurgunn Kjelnæs vm. og Halda Olsen hm., dáma sera væl at hugna sær á spæliplássinum í Rituvík*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað er mikumorgun í Rituvík. Ikki eitt menniskja er at síggja nakrastaðni. Vit koyra gjøgnum alla bygdina, og venda har úti og leggja leiðina aftur móti Runavík.

Tá síggja vit bráddliga nøkur børn í teimum gulu og eyðkendu búnunum við endurskininum uppiá. Tey eru á veg niðan á spæliplássið í bygdini saman við dagrøktarmammuni, Haldu Olsen.

Vit bíða eitt lítið bil, tí undan einum húsahorni síggja vit uppaftur fleiri børn koma, saman við teirra dagrøktarmammu, Sigurgunn Kjelnæs. Íalt savnast 9 børn saman henda vakra morgunin á spæliplássinum.

Spæliplássið er rættiliga nýtt og er ikki heilt liðugt enn. Men tað er so mikið væl útgjørt, at tað kortini kann brúkast hjá børnunum. Ikki bert børnini í Rituvík brúka tað, tí av og á koma eisini børn úr Æðuvík hagar.

– Okkum dámar sera væl at koma her. Og eg haldi, at hetta man vera eitt tað besta spæliplássið í allari kommununi, sigur Sigurgunn.

### Tey blíva so góð við meg

Sigurgunn hevur verið dagrøktarmamma í samfull 14 ár. Og henni dámar hetta arbeiðið sera væl.

Hon hevur í løtuni fimm børn – fýra í fullari tíð og eitt í hálvari tíð. Fýra teirra eru úr Rituvík og eitt úr Æðuvík, og eru tey í aldrinum 1 upp í 5 ár.

– Mær dámar sera væl at hava hesi børnini. Annars hevði eg ikki verið í hesum starvinum í øll hesi árini!

– Tað er eitt virkiliga deiligt arbeiði, sigur hon.

Eitt gott við arbeiðinum er, at hon kann vera heima hjá sær sjálvum, og hon kann somuleiðis vera heima, tá hennara egnu børn koma úr skúlanum.

– Jú, mær dámar væl at fáast við børn. Eg haldi, at eg sjálv fái so nógv aftur frá teimum. Tey blíva so góð við meg, og eg blívi so góð við tey. So tað er sera gevandi, skal eg siga tær, sigur Sigurgunn.

### Til tey gerast køld

At fara yvir í spæliplássið í bygdini er nakað børnunum dámar serliga væl.

Serliga um summarið verður ofta farið yvir á spæliplássið, meðan tær um veturin fyri tað mesta halda børnini innanveggja.

Í vetur hevur ikki viðrað so gott, men mikudagin var veðrið sera gott, og tí var farið í spæliplássið við børnunum. Henda dagin vóru tey 9 í tali, umframt báðar dagrøktarmammurnar.

Og her kunnu børnini stuttleika sær í langa tíð - í roynd og veru líka til tey gerast køld. Um summarið ofta upp í einar tveir tímar, men tá ein hevur smærri børn í fylginum, gerast tey skjótari køld enn hini, og tí má umsjón takast við teimum.

Halda og Sigurgunn eru einastu dagrøktarmammurnar í Rituvík, men tær hittast tó hvønn mánamorgun saman við starvsfelagum sínum í fimleikarhøllini í Glyvra skúla. Tá er mikið rok og gangur, tá tær 20 dagrøktarmammurnar og tey umleið 100 børnini hugna sær saman. So er – og soleiðis skal tað helst vera – tá børn koma saman.